Selja smábørn

Myndugleikarnir í Albania hava handtikið tvey fólk, sum eru skuldsett fyri at hava roynt at fáa kvinnur at selja síni børn, longu áðrenn tey eru komin í verðina. Keypararnir eru í Grikkalandi.

Albanska løgreglan sigur, at eitt brotsmannalið hevur boðið ungum fátækum kvinnum at fara til býin Tessaloniki har norðuri í Grikkalandi. Í Tessaloniki eru kvinnurnar lagdar inn á eina lítla sjúkrastovu, har ein lækni so hevur tikið barnið við keisaraskurði. Frammanundan hava kvinnurnar skrivað undir eina váttan um, at tær hava sagt rættin til barnið frá sær.

Løgreglan í Albania kannar eisini, um brotsmannaliðið kann hava selt gøgn, sum eru tikin úr smábørnum.

Lønarmunurin veksur

Nýggj tøl hjá norska hagtalsstovninum vísa, at munurin á lønini hjá kvinnum og monnum í Noregi bara veksur.

Sambært tølunum fingu norskir menn góðar 30.000 krónur meiri í løn í fjør enn kvinnurnar. Tølini vísa eisini, at síðani 1997 hava menninir fingið 8.000 krónur meiri í lønarhækking enn kvinnurnar, og tað er serliga á tí privata arbeiðsmarknaðinum, at munurin er stórur.

Á Hagstovuni verður hildið, at menn velja yvirhøvur arbeiði, sum geva meiri løn.

Við báti til Finnlands

Nakrir kurdar royndu sunnukvøldið at sleppa til Finnlands við báti.

Teir átta kurdarnir lógu fjaldir í einum estlendskum seglbáti, tá eitt skip hjá finsku sjóverjuni kom fram á bátin nakað sunnan fyri Helsingfors. Finsku myndugleikarnir siga, at ein av kurdunum er úr Irak, og at hinir eru úr Turkalandi. Eitt barn var teirra millum.

Tveir estlendingar, sum vóru í seglbátinum, eru settir í varðhald. Teir eru skuldsettir fyri at vera komnir til Finnlands á ólógligan hátt.

Nýggj hít móti AIDS

Granskarar í Suðurafrika hava gjørt eina nýggja hít, sum eftir teirra tykki kann fáa avgerandi týdning fyri stríðið ímóti AIDS.

Royndir vísa, at tað tekur millum 30 og 40 sekund at rulla eina vanliga hít upp á pláss, men tann nýggja hítin kann fáast upp á pláss eftir bert tveimum ella trimum sekundum, sjálvt um tað er bøla myrkt. Sambært granskarunum er tað júst tann drúgva tíðin, sum skal til at fáa eina vanliga hít upp á pláss, sum ger, at nógv lata hítina liggja í pakkanum.

Myndugleikarnir í Suðurafrika hava longu boðað frá, at tær nýggju hítirnar verða lítið og einki dýrari enn tær vanligu.

UTTAN ÚR HEIMI

Hava eingi prógv ímóti Irak



Eftir fundin við George W. Bush í Camp David segði Tony Blair, at altjóða kjarnorkustovnurin IAEA hevur eina frágreiðing, sum prógvar, at Irak hevur ella arbeiðir við at fáa sær kjarnorkuvápn. Men IAEA avsannar orð hansara

Altjóða kjarnorkustovnurin avsannar, at stovnurin hevur nakran kunnleika um kjarnorkuútbygging í Irak. Tað segði bretski forsætisráðharrin, at stovnurin hevur

IRAK-KREPPAN
Árni Joensen:

Á tíðindafundi aftan á fundin við amerikanska forsetan, George W. Bush, um vikuskiftið segði Tony Blair, forsætisráðharri, at altjóða kjarnorkustovnurin IAEA hevur upplýsingar, sum prógva, at Irak hevur ella er í ferð við at útvega sær kjarnorkuvápn.

Blair segði, at IAEA hevur nýggjar fylgisveinamyndir, sum vísa, at irakar eru í ferð við stórar útbyggingar á fyrrverandi kjarnorkustøðum, og at hetta er til skjals í einari nýggjari frágreiðing hjá stovninum.

Men hetta avsannar IAEA. Í einari fráboðan, sum stovnurin sendi út sunnukvøldið, stendur, at stovnurin hevur ikki gjørt nakra slíka frágreiðing um Irak.

– Altjóða kjarnorkustovnurin skal gera vart við, at hann hevur ikki nakrar nýggjar upplýsingar um irakskar kjarnorkuverkætlanir síðani desember í 1998, tá vápnaeftirlitsmenninir fóru úr landinum. Fyrr enn arbeiðið hjá eftirlitsmonnunum verður tikið uppaftur, kann stovnurin ikki gera nýggjar niðurstøður, hvørt Irak heldur ásetingarnar í ST-samtyktunum um landsins kjarnorkuvirksemi ella ikki, stóð í fráboðanini hjá IAEA.

Talsmaðurin hjá kjarnorkustovninum, Mark Gwozdecky, segði við amerikanska sjónvarpið CNN í gjár, at orðini hjá Blair hava helst samband við eina grein, sum stóð í New York Times seinasta fríggjadag. Tá segði ein fyrrverandi vápnaeftirlitsmaður við blaðið, at fylgisveinamyndir hava víst virksemi á fyrrverandi kjarnorkustøðum í Irak. Franski eftirlitsmaðurin Jacques Baute segði við New York Times, at hetta virksemi er møguliga í stríð við ST-samtyktirnar, men legði afturat, at tað eru eingi prógv, sum gera, at tað ber til at siga tað við vissu.

Óttin fyri kríggi styrkir Schrøder

Nógvir týskarar eru ímóti kríggi við Iran og Saddam Hussein, og tað kemur kanslaranum væl við, nú valið til samveldistingið nærkast

TÝSKA VALIÐ
Árni Joensen:

Nú minni enn fjúrtan sagar undan valinum í Týsklandi bendir nógv á, at veljararnir hava gloymt tey stóru arbeiðsloysistølini, og at fólk heldur eru farin at tosa um vandan fyri, at Týskland verður drigið upp í eitt vesturlendskt kríggj ímóti Irak og Saddam Hussein.

Gerhard Schrøder, kanslari hevur alla tíðina ávarað amerikanarar ímóti at leypa á Irak, og hetta endurtók hann um vikuskiftið, tá hann hitti franska forsetan Jacques Chirac.

Mótvalevnið, Edmund Stoiber, tekur undir við álopi á Irak, treytað av góðkenning í trygdaráðnum hjá ST, og hann hevur lagt kanslaran undir at seta Týskland uttan fyri hin partin av Evropa. Harafturat heldur Stoiber, at tann avgjørda støðan hjá Schrøder kann koma viðurskiftunum millum Týskland og USA í vanda.

Ein kanning í blaðnum Der Spiegel vísir, at 64 prosent av týskarunum eru ímóti kríggi við Irak, og 58 prosent halda, at ein stjórn undir leiðalu av Gerhardi Schrøder, kanslara og Joschka Fischer, uttanríkisráðharra er betur før fyri at tryggja friðin enn ein borgarlig stjórn við Edmundi Stoiber í kanslarastólinum. Einans 25 prosent halda Stoiber vera ta betru trygdina fyri friði.

Týski verjumálaráðharrin, Peter Struck, segði sunnudagin, at so leingi sosialdemokratarnir sita í stjórnini, verður eingin týskur hermaður sendur til Irak. Hann legði afturat, at Týskland fer ikki at kenna seg bundið til at senda hermenn hagar, sjálvt um trygdarráðið hjá ST skuldi góðkent amerikansku álopsætlanina.

Men Gerhard Schrøder man neyvan vera serliga fegin um, at hann nú fær rós úr Bagdad. Um vikuskiftið segði irakski uttanríkisráðharrin, Naji Sabri, at Týskland hevur tikið ta røttu stoðuna, sum vísir, at stjórnin í Berlin skilir tann stóra vanda, sum liggur í amerikansku krígsætlanini.

Tað var ivaleyst hetta, sum fekk ein talsmann hjá sosialdemokratiska flokkinum at gera vart við, at avgerðin hjá kanslaranum umfatar bert beinleiðis álop á Irak. Samtykkir ST hinvegin at leggja trýst á Irak fyri at fáa landið at loyva vápnaeftirlitsmonnunum aftuir til arbeiðis, fer Týskland at taka undir við tí, segði talsmaðurin.

ítróttur

Nr. 172 • týsdagur • 10. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Henrik kendi seg at hava tapt tvey stig

Kortini væl nøgdi føroyski venjarin segði seg ikki ivast í, at hansara lið í EM undankappingini fór at røkka teimum seks stigunum, sum hann frammanundan hevði roknað við

FØROYAR–SKOTLAND
Jóannes Hansen

Hann smíltist um alt fimm oyrað, tá hann kom á tíðindafundin, og hann duldi ikki, at hann var fegin, men kortini segði hann seg kenna tað sum um hansara spælarar høvdu tapt.

Henrik Larsen, landsliðsvenjari:

– Eg kann ikki rósa spælarunum nóg mikið fyri avrikið, sum teir hava víst. Men kortini kenni tað soleiðis – og tað gera spælararnir eisini – sum at vit hava tapt tvey stig og ikki vunnið eitt stig. Tað sigur seg sjálvt, tá dysturin lagaði seg soleiðis, sum hann gjørdi. Vit vóru á odda 2–0, og vit harmast allir um, at tað ikki eydnaðist John Petersen tíðliga í 2. hálvleiki at økja til 3–0. Um tað hevði eydnast honum at gjørt tað, so ivist eg onga løtu í, at vit høvdu havt vunnið dystin.

Var tað orsøkin til, at John varð tikin av vøllinum?

– So avgjørt ikki. John var sera vandamikil, og eg hevði ikki funnið uppá at tikið hann út, um hann ikki sjálvur bað um tað. John fekk ein snudd í fótin, og tí varð hann tikin av vøllinum eftir eitt stórt avrik.

Tú hevur alla tíðina, síðani tú gjørdist venjari, sagt, at Føroyar fóru at fáa seks stig í hesi undankappingini?

– Ja, og vit eru væl á veg. Vit kundu havt fingið eina uppaftur betri byrjan. Tað var spell, at vit ikki fingu hana. Men vit hava góðar møguleikar at vinna fleiri dystir. Vit spæla hvørja ferð fyri at fáa øll stigini. Tað fara vit eisini at gera á útivølli í komandi dystunum.

Hvat heldur tú um spælið hjá Skotlandi?

– Tað er ikki mín uppgáva at siga so nógv um teirra avrik. Men teir spældu ikki væl. Eg dugi ikki at siga tykkum hví. Tað kunnu tíðindamenninir og skotarnir sjálvir gera. Men eg eri sera fegin um okkara avrik.

Tú segði teg hava hugt at dystinum millum Skotland og Danmark. Fekst tú nógv burturúr tí?

– Avgjørt. Skotska liðið spældi betri í dag, enn tað gjørdi ímóti Danmark. Men vit fingu avgjørt gagn burturúr tí dystinum. Tá legði eg til merkis, at teir høvdu stórar trupulleikar í økinum millum miðjuna og verjuna. Vit spældu uppá at fáa bóltarnar út í hesi økini, og tað eydnaðist fleiri ferðir sera væl.

Føroyska liðið var undir stórum trýsti fyrra partin av 2. hálvleiki. Hugsaði tú ikki um at styrkja um miðverjuna, eitt nú við at seta Hans Fróða Hansen inn í miðverjuna?

– Nei, tað gjørdi eg ongantíð. Tað var hugaligt at staðfesta, at miðverjan og liðið alt kom undan trýstinum, og at tað í síðsta enda vóru okkara menn, sum høvdu nógv teir størstu møguleikarnar at fáa sigursmálið.

Hvussu metir tú avrikið hesa ferð, tá tað verður sammett við tað ímóti Liktinstein?

– Hetta var nógv betur. Serliga í 1. hálvleiki ímóti Liktinstein, vóru spælararnir eitt sindur ótryggir. Tað vóru teir avgjørt ikki hesa ferð. Vit høvdu fleiri eitt hundrað prosent møguleikar, men tíverri megnaðu vit ikki at fáa størri úrtøku enn skotarnir fingu. Tað haldi eg, at vit høvdu havt uppiborið. Segði Henrik Larsen.

- Vit kundu havt fingið eina uppaftur betri byrjan. Tað var spell, at vit ikki fingu hana. Men vit hava góðar møguleikar at vinna fleiri dystir, segði ein væl hýrdur Henrik Larsen millum annað eftir dystin

Mynd: Álvur Haraldsen

Berti átti ongan góðan

Skotsku tíðindafólkini vóru sera ágangandi við týska venjaran hjá Skotlandi, sum ásannaði at hansara menn høvdu verið hepnir og framvegis segði seg vóna, at hansara lið hevði møguleika at sleppa við í EM endaspælið

FØROYAR-SKOTLAND
Jóannes Hansen

Hann man vera ein tann kendasti, sum nakrantíð hevur verið á Svangaskarði, og hann man vera ein tann einsamallasti, sum nakrantíð hevur verið har.

Tað er Berti Vogts, sum tað snýr seg um. Vesturtýskur HM og EM vinnari sum spælari, EM vinnari sum venjari og hjálparvenjari hjá sjálvum Franz Bäckenbauer, tá Týskaland seinast gjørdist heimsmeistari.

Týsku tíðindamenninir á Svangaskarði lótu einki serligt at. Søgdu at Berti Vogts ikki hevur fólkatekki og hevur vánaligt samband við heimligu pressuna. Skotsku tíðindamenninir á Svangaskarði vóru eirindarleysir. Tað var týðuligt, at teir mettu seg sjálvur sum samstarvsfelagar, og at teir høvdu ein, sum teir vóru felags um at jagstra. Tað var Berti Vogst.

– Eg eri harmur um avrikið hjá mínum monnum í dag. Teir spældu bara fótbólt í 45 minuttir, og tað vóru teir síðstu 45 minuttirnir. Í 1. hálvleiki gjørdu teir einki, púrt einki. Teir vóru aftanfyri 2–0, og munurin kundi havt verið uppaftur størri.

Hví gjørdu teir einki?

– Eg veit tað ikki. Tað var ikki tað, sum eg hevði biðið teir um, og tað var ræðuligt. Í steðginum segði eg við teir, at tað framvegis var nóg nógv tíð til at venda gongdini og at vinna dystin. Í 2. hálvleiki høvdu vit nógv meiri spæl enn móttstøðumenninir, og vit kundu havt vunnið dystin. Føroyingarnir gjørdu nógv mistøk, men tíverri vóru vit ikki nóg góðir til at sekta mistøkini.

Men teir høvdu stórar møguleikar at fáa fleiri mál?

– Soleiðis verður tað altíð, tá tú spennir álopsbogan.

Tá tað leið ímóti endanum, og støðan framvegis var 2–1 til Føroyar. Roknaði tú tá við, at tú fórt at missa sessin?

– Men dysturin endaði 2–2. So hatta er ein óveruligur spurningur.

Metir tú framvegis at tað er møguleiki fyri at røkka EM endaspælið?

– Tað er almikið av arbeiði, so mugu spælararnir arbeiða allar 90 minuttirnar og ikki bara helvtina av tíðini, segði illa sperdi Berti Vogts.

Týsku pressuumboðini vildu hava venjaran hjá skotum at svara spurningum á týskum. Men tað var ikki talingur um. Berti Vogst smoygdi sær av einum tí best vitjaða tíðindafundinum nakrantíð á Svangaskarði. Í flogfarinum aftur til Glasgow mundi hann fáa frið, men tá skotska ferðalagið kom í lufthavnina har niðri, var friðurin úti.



– Tað er almikið av arbeiði, sum vit skulu útinna. Eftir dystin í Íslandi 10. oktober verða vit væl klókari, enn vit eru nú. Men skulu vit vinna nakran dyst, so mugu spælararnir arbeiða allar 90 minuttirnar og ikki bara helvtina av tíðini, segði illa sperdi Berti Vogts á tíðindafundinum eftir dystin

Mynd: Álvur Haraldsen